

www.oljan.fo

**Jan Müller** 20 - 11 - 2012

# Føroyingar funnu olju I Barentshavinum

Fleiri og fleiri føroyingar útbúgva seg til at arbeiða í altjóða oljuvinnuni, og tí eru alsamt fleiri teirra partur av altjóða oljuumhvørvinum. Tað er tí ikki óvanligt longur, at føroyingar, sum arbeiða hjá altjóða oljufeløgum, eru við til at gera spennandi oljufund. Hetta hendi m.a. í fjør, tá heimsins største oljufund í 2011 varð gjørt á norska landgrunninum. Tá vóru tað oljufeløgini Statoil, Det Norske Oljeselskab og Lundin, sum funnu Johan Sverdrup oljukelduna. Og tríggir føroyingar vóru í leiðandi størvum í teimum trimum oljufeløgunum, nevniliga Rúni M. Hansen, Teitur Poulsen og Tummas Pauli í Mýri. Nú hevur Lundin, har Teitur Poulsen og Tummas Pauli Mýri sita í týðandi størvum, funnið olju sunnan fyri Skrugard og Havis keldurnar í Barentshavinum, har Statoil fann stórar nøgdir av olju nøkur ár herfyri. Enn er óvist, um talan er um lønandi nøgdir av kolvetnum. Leitað hevur verið eftir olju og gassi í Barentshavinum í meira enn 30 ár. Boraðir eru umleið 90 brunnar, og nøkur ár herfyri vórðu gjørd nøkur fund, sum av ávara settu norska partin av Barentshavinum á breddan. Statoil hevur boðað fra, at tað fer at bora ikki færri enn 9 leitibrunnar í Barentshavinum í 2013. Statoil hevur so eisini í hyggju at bora brunnar í bæði tí kanadiska og amerikanska partinum av Arktis umframt í Grønlandi. Umframt Statoil fokusera eisini fleiri onnur oljufeløg uppá Barentshavið, eitt nú GDF Suez, Repsol, Total, OMV og Eni. Eisini tað føroyska Faroe Petroleum er við í leitingini eftir kolvetnum í Barentshavinum í fleiri loyvum. Tað er so eisini við í Íslandi, og royndir hava eisini verið gjørdar at vera partur av oljuleitingini í Grønlandi. Tað er tí ein sannroyd, at føryingar eisini eru partur av oljuleitingini í arktiska økinum.